**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3143, P/F TG 540, 800 Tvøroyri.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Kaj Christinsen, Havremarken 27, DK-7730 Hanstholm.
Innkomin í nevndina: Freddy Frost, Tranevej 1, DK-7700 Thisted.

Skráseting Føroya tann 22. november 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2696, Sp/f Norðcon, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 29.12.2000.
Kapitalur:
Hækking við kr. 550.000,00 til kr. 740.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 550.000,00 til kurs 100.
Nevnd:
Innkomin í nevndina: Sigurð í Jákupsstovu, Kráargøta 1, 160 Argir (formaður), Niels Winther Poulsen, Millum Gilja 8, 188 Hoyvík og Sjúrður Horsdal, Millum Gilja 19, 188 Hoyvík.
Tekningarreglur:
Felagið verður teknað av stjóra, nevndarformanni ella tveimum nevndarlimum.

Skráseting Føroya tann 22. november 2001

Kristin Balle

---

# Leiðari til skiljihøllina hjá IRF á Hagaleiti

IRF søkir við hesum eftir leiðara til Skiljihøllina á Hagaleiti at byrja 2/1-2002, ella skjótast tilber.

Leiðarin hevur beinleiðis tilvísing til leiðsluna í IRF.

- standa fyri móttøku og viðgerð av pappíri, stórsekkjum, dekkum og trolleivdum o.l.
- standa fyri avskiping og sølu av tilfarinum
- samskifta við kommunur og virkir um skiljing av burturkasti
- vera við at gera upplýsandi tilfar um endurnýtslu
- vera við at tilrættaleggja innsavningina
- hava ábyrgd av viðkomandi starvsfólkum

Allar skrásetingar verða dagliga førdar á teldu, og er tað tí avgjørt neyðugt, at umsøkjarin hevur góðan praktiskan og teoretiskan kunnleika til skrivi-, rokni- og telduarbeiði. Kunnleiki til Concorde Axapta og SQL er ein fyrimunur.

Arbeiðið er sjálvstøðugt og fjølbroytt, hevur nógvar persónligar menningarmøguleikar, eins og tað setur krøv til góð samstarvsevni, menniskjansligan og fakligan førleika. Alt hetta í einum góðum arbeiðsumhvørvi.

Lønin verður sett eftir avtalu.

Hevur tú hollar vinnuroyndir og ástøðiliga útbúgving, eitt nú miðnáms- ella aðra viðkomandi útbúgving, ert tú møguliga tann vit søkja.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Erik Lervig ella Poul Andrias Joensen, tlf. 443343.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum ummælum verður at senda til:

**IRF**
att.: Poul Andrias Joensen
Postboks 39 · FO-520 Leirvík

*innan 7. desember 2001*

***IRF hevur til endamáls:***
*Sambært umhvørvisverndarlógini hava kommunurnar ábyrgdina av innsavning og viðgerð av burturkasti.*

*IRF ger hetta arbeiðið fyri kommunurnar.*

*IRF hevur eina brennistøð, skiljihøll til pappír og papp, seks tyrvingarpláss, umlastingarstøð, ruskbilar, oljureinsiverk, lastbila- og bingjuverkstað, slamsúgvarar og rottangatænastu.*

*Uml. 60 fólk eru í starvi hjá IRF.*

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## MÁLSVIÐGERI TIL BYGGI- 0G BÝARSKIPANARDEILDINA

Søkt verður eftir starvsfólki við tekniskari útbúgving til byggimálsviðgerð o.a. at byrja beinanvegin. Talan er um eitt fulltíðarstarv á byggi- og býarskipanardeildini.

**Høvuðsuppgávur**
- Byggimálsviðgerð.
- Byggieftirlit.
- At fyrireika mál, ið skulu leggjast fyri byggi- og býarskipanarnevndina, og skipa fyri avgreiðslu av nevndar- og býráðssamtyktum.
- Samskifta við borgarar, feløg og stovnar.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal vera útbúgvin tekniskt hjálparfólk, byggiteknikari, byggifrøðingur, verkfrøðingur ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

Umsøkjarin skal duga væl føroyskt og helst hava kunnleika til telduforritini MS Office, AutoCad/MicroStation GeoOutlook.

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at umsøkjarin dugir væl at leggja arbeiðið til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og er til reiðar at luttaka í øðrum arbeiði á deildini enn omanfyri nevnt.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett beinanvegin ella skjótast til ber. Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv , ið er fakliga og persónliga mennandi við góðum arbeiðsumstøðum.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marius Müller, tekniska stjóra, ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 10.12.2001. Viðmerkt á umsóknina "starv á byggi- og býarskipanardeildini".

S N A R S K I V A N

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1821, Sp/f Ísak B. Jacobsen, 380 Sørvágur.

Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Ísak Benediktus Jacobsen, 380 Sørvágur.

Felagið er tann 02.10.2001, farið í likvidatión við Demmus Hentze, lrs., E. Jalsgøta 1, Box 236, 110 Tórshavn sum likvidator.

Skráseting Føroya tann 22. november. 2001.

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. 2500, Føroya Sparikassi, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Egil Guldbrandson Olsen, Nýggivegur, 620 Runavík (starvsfólkavald).
Innkomin í nevndina: Rakul Dam, Orknoyarvegur 3, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 22. november 2001

Kristin Balle

---

# Hús til sølu



Hús í trimum hæddum á Heygavegi 20 í Klaksvík til sølu, um hóskandi boð fæst.

Hvør hæddin er 50 fermetrar, stykkið er 400 fermetrar, við hjalli á stykkinum.

**Tlf. 457668 - 217668**

---

## ROVER 75 V6 2,0 CLUB

**Vegna keyp av stationcar selist ein Rover 75 2,0 Club myrkagrønur metallic, 150 HK, árg juni 2000, km. 26.800, eyka sett av alufelgum við pikadekkum, CD anlegg + ymiska aðra útgerð**

**fyri kr. 275.000,-**

**(uttan div. útgerð kr. 258.000,-**

**D. B. Bilar**
J. Broncksgøta 15 • Boks 1079
Tel. 31 06 00 • Fax 31 06 50



KPMG

# Starvsfólk
## til skatta- og avgjaldsøkið

Virksemi okkara innan skatta- og avgjaldsøkið er støðugt vaksandi. Vit hava tí brúk fyri einum starvsfólki afturat, sum burturav skal arbeiða við skatta- og avgjaldsspurningum.

***Starvslýsing***
Arbeiðið fevnir um ráðgeving og tænastur innan skatta- og avgjaldsøkið. Innan **skattaøkið** fevna uppgávurnar um ymiskar skattligar spurningar viðvíkjandi
- persónum
- feløgum
- grunnum
- deyðsbúgvum v.m.

bæði sæð í mun til innanhýsis føroyskar skattareglur og í mun til tær tví-skattaavtalur, sum Føroyar hava við onnur lond.

Á **avgjaldsøkinum** er serliga talan um viðgerð av ymsum spurningum um meirvirðisgjald.

Tær einstøku uppgávurnar verða vanliga loystar í samarbeiði við grann-skoðararnar.

Fleiri av uppgávunum verða loystar í samstarvi við KPMG skrivstovur og aðrar grannskoðarafyritøkur í øðrum londum, serstakliga í Danmark, Íslandi og Noregi.

Talan er um eitt áhugavert og sjálvstøðugt starv, har rætti umsøkjarin hevur høvi at seta sín dám á starvið.

***Umsøkjarin***
Tann, ið settur verður, skal hava
- hóskandi ástøðiliga útbúgving
- viðkomandi arbeiðsroyndir
- lætt við at samstarva
- evni at samskifta í skrift og talu á føroyskum, donskum og enskum

Roknað verður við at viðkomandi er fryntligur og fyrikomandi og til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, um tørvur er á tí.

Lønin verður ásett eftir útbúgving og royndum.

***Umsóknin***
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving verður at senda okkum skjótast gjørligt ella í seinasta lagi 15. desember 2001.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Paula Ellefsen ella Súna Schwartz Jacobsen á telefon 34 34 34.

*Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.*

***KPMG***

Vit eru 25 starvsfólk, herav 2 statsaut. revisorar, 3 cand.merc.aud., fleiri við HD og á veg til HD og cand.merc.aud., og ein við serroyndum innan edv.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f, sum er føroysk ogn burturav, er limur í KPMG International, eitt av heimsins størstu samtøkum av grannskoðarafyritøkum við meira enn 100.000 starvsfólkum til samans.

KPMG veitir tænastur innan grannskoðan, roknskap, fíggjarstýring, skatt og mvg, og aðrar serligar tænastur á hægsta góðskustigi.

Endamálið við KPMG International er, at kundar hjá KPMG í gjøgnum samstarv millum grannskoðara-fyritøkur kunnu fáa somu tænastur og somu høgu góðsku um allan heimin. Limaskapur okkara í KPMG ger eisini, at bæði vit og kundar okkara kunnu fáa beinleiðis samband við serdeildir í stórum útlendskum grannskoðarafyritøkum.

KPMG í Føroyum hevur ein góðan og breiðan kundaskara við bæði stórum og smáum kundum innan handil, ídnað, fíggjarstovnar, kommunur og stovnar undir landinum.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn, Tel 34 34 34, Fax 34 34 35
Heimasíða: www.kpmg.fo, E-mail: kpmg@kpmg.fo

team85

---

## Tekning til

## ATLANTIC AIRWAYS KAPPING
## MISS GALAXY EUROPE 2001



tann 7. desember er á tlf 213546 / Jákup
Tekningarfreistin er 21. november

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2340, Sp/f Urðhamar, 700 Klaksvík.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Kristoffer Steintór Klakstein, á Brekku 23, 700 Klaksvík (formaður), Jaspur Ulbanus Klakstein, Kirkjubrekka 4, 700 Klaksvík og Pauli Klakkstein, Undir Hálsi 34, 700 Klaksvík.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Eydna Thomsen, Undir Hálsi 32, 700 Klaksvík.

Felagið er tann 25.09.2001, farið í likvidatión við Alfred Petersen, advokati, Bøgøta 16, Box 164, 110 Tórshavn sum likvidator.

Skráseting Føroya tann 15. august. 2000.

Kristin Balle

---




---

# Stuðul til uppihaldspening

Umsókn um stuðul til uppihaldspening saman við kvittan fyri goldnan pening fyri seinra hálvár 2001 skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi hin 5. desember 2001. Peningurin verður avgreiddur hin 20. desember 2001.

**Almannastovan**
Postboks 3096
110 Tórshavn